

Mynd:

# Sjónband: Heimsins størsta skip á veg til Evropa

**Jógvan Hugo Gardar**

18.11.2014 - 13:54

Oljan.fo

Í desember er meiningin at tað sum kallast heimsins størsta skip, "Pieter Schelte", skal koma til Evropa, og heimlandið Holland.

Talan er um ein risa sum skal kunna flyta boripallar. Skipið skal kunna fara eftir einum boripalli sum er bygdur á landi, og flyta hann út har hann skal liggja. Tá boripallurin hevur gjørt tað hann skal á einum stað, so skal "Pieter Schelte" kunna koma eftir honum aftur og flyta hann til ein nýggjan boribrunn ella inn til lands aftur.

Ein av fyrstu uppgávunum hjá skipinum verður tá hann í summar skal í Norðsjógvin at taka Yme-boripallin og flyta hann til lands aftur. Yme-pallurin hevur ligið óvirkin í tvey ár og bíða eftir at verða fluttu.

"Pieter Schelte" er 320 metrar til longdar, 127 metrar breiður og 70 metrar høgur.







